## Stjørnan er í finaluni

Alt skal ganga skeiva vegin hjá Stjørnuni, um tær ikki skulu røkka steypafinalunum í kvinnuhondbólti. Hóskvøldið taka tær ímóti Neistnaum, og í fyrru hálvfinaluni var eingin slingur í stjørnuvalsinum. Henda dystin vann Stjørnan við 16 málum, og tí hava liðini bara æruna at spæla fyri henda dagin. Stjørnan hevur meir enn annað beinið í finaluni, og ilt er at ímynda sær, hvussu Neistin fer at megna at seta seg upp til ein slíkan dyst, har tær slett yvirhøvur einki hava at spæla um.

## 11 føroyskir rógvarar til NM

Sjey føroyskir rógvarar megnaðu at rógva seg til NM-kappngina, tá RSF hevði úttøkukapping á Giljanesi. Hartil hava eisini fýra onnur føroysk róðrarfólk lokið krøvini, so hesi eisini eru partur av kappingini. Tey ellivu, sum taka lut í kappingini, eru hesi:

Gerda Olsen (13-14 ár), Lis Elin Weihe Nielsen (15-16 ár), Karl Danielsen og Beinir Danielsen (19-22 ár), Súsanna S. Sørensen og Katrin Olsen (opin bólkur, kvinnur lættvekt), Sigurd Nordendahl og Lars Abrahamsen (opin bólkur, menn lættvekt), Uni Oknadal og Búgvi Poulsen (veteranar, lættvekt) Og Heini Hátún, sum skal kappast í opna bólkinum fyri veteranar.



*Mynd: Heini*
*Mynd: www.drekin.fo*

# Undurbarnið frá Egyptalandi

**Hussein Ali Zaky er ein av bestu hondbóltsleikarum í heiminum. Egyptaland er longu sligið út úr HM, men Zaki setti síni spor í endaspælinum við 18 málum**

PROFILUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

»Gimsteinur frá Nilen« bleiv hann róptur, tá hann tók hondbóltsheimin við stormi til HM-endaspælið í Fraklandi í 2001. Hussein Ali Zaki frá Egyptaland var ein fragd fyri eyga, og hann var ikki minst maðurin aftanfyri fantastiska úrslitið hjá Egyptalandi hetta árið.

Heilt óvæntað sló Egyptaland russiku bjørnina út í fjórðingsfinaluni, men longri komu teir ikki. Teir endaðu á einum 4. plássi í HM, men ein nýggj stjørna var fødd.



*»Gimsteinurin frá Nilen« er longu saman við sínum egyptisku liðfeløgum sligin út úr HM, men hondbóltsáhugaði kunnu vænta nógv av Zaki í framtíðini*

*Mynd: Scanpix*

### Zaki slapp ikki til Evropa

Zaki, sum hann vanliga verður nevndur, er ein av teimum fáu hondbóltsspælarunum, sum kunnu fáa áskoðarar at gloyma alt um støðuna í einum dysti. Hann kann bergtaka áskoðarar í ein sovorðnan mun, at teir bert sita og hyggja eftir elegantu kropsfintunum, góða hondbóltseyganum, og ótrúliga skotinum egyptiska spælskiparanum.

Eftir HM-endaspælið í Fraklandi fingu fleiri evropeisk stórfeløg eyguni upp fyri tá 21-ára gamla spælskiparanum. Stórfeløg úr Týsklandi og Spania stóðu á rað fyri at tryggja sær undirskriftina hjá Zaki, men ikki bar til at fáa fatur á honum, tí egyptar sluppu ikki úr landinum, fyrrenn teir vóru 28-ára gamlir.

Tí mátti Zaki bíða við sínum evropeisku ævintýri, men ikki gekk long tíð. Týðandi egyptiski hondbóltspresidenturin fekk bent reglurnar so mikið, at egyptiskir leikarar sluppu út í heim at spæla hondbólt undan næsta HM-endaspælið, sum var í Portugal 2003.

Zaki valdi at halda fram í spanska felagnum, Ciudad Real, so nú gekk leiðin til Spania.

### »Gimsteinurin« steðgaði upp

Í Ciudad Rela gekk tó einki serligt hjá Zaki. Hann fekk ongantíð gongd á spælið, og um somu tíð bleiv hann ógreiður við venjaran á egyptiska landsliðnum, týskaran Jürg-Uwe Lommel. »Gimstienurin frá Nilen« var steðgaður upp á síni yrkisleið, og framtíðin hjá unga egyptanum sá ikki serliga ljós út.

Nú er Zaki tó við at koma í gongd aftur. Gamli venjarin, Zoran Zivkovic, er aftur venjari á egyptiska landsliðnum, Zaki hevur skift tilveruna í Ciudad Real út við eina tilveru í Aragon, og nú byrjar spælið spakuliga at hanga saman aftur.

Tíverri fyri hondbóltsáhugaði eru Zaki og Egyptaland sligin út í HM-endaspælinum, men »gimsteinurin« er neyvan liðugur at bergtaka fólk, tí hann er hóast alt bert 27 ára gamal.

**FAKTA**

Føddur: 01. mars 1979
Stað: Alexandria, Egyptaland
Hædd: 190 cm
Vekt: 85 kg
Lið: Aragon
Pláss á vøllinum: Miðja

# Kyndilsleikarar aftur á landsliðið

**- Sum menniskja og landsliðsvenjari haldi eg, at man skal taka ímóti eini slíkari umbering. Orðini eigur landsiðsvenjarin í hondbólti, Birgir Hansen, sum sigur, at kyndilsleikararnir skulu vera vælkomnir aftur á landsliðið**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyri trimum vikum síðani var landsliðsvenjarin í hondbólti, Birgir Hansen, knívskorin í sínum holdningum til landsliðsavboðini frá kyndilsleikarunum. Hann segði, at stóð tað til hann, so skuldi ein slík avgerð revsast við einum leikbanni til allir kyndilsleikararnar, sum meldaðu avboð til landsliðið, eftir at kappingarnevndin hjá hondbóltssambandinum hevði dømt Hans Áka Dal Christiansen leikbann í tríggjar dystir.

### Sleppa aftur á landsliðið

Birgir Hansen sigur seg fegnast um, at leikararnir hjá Kyndli hava sæð í eyguni tað stóra mistak, sum teir gjørdu, tá teir valdu at taka leikararnar av landsliðnum.

– Teir innrømma, at teir hava gjørt ein feil. Teir biðja um umbering fyri henda feilin, og nú haldi eg, at vit skul taka umberingina frá teimum til eftirtektar. Stendur tað til mín, so er hetta málið nú nullstillað, so eg kann siga, at kyndilsleikararnir eru tøkir aftur til landsliðið.

Landsliðsvenjarin leggur tó afturat, at hann var als ikki glaður um avgerðina, sum leikararnir hjá Kyndli tóku, eftir at kappingarnevndin hevði givið honum leikbann.

- Eg var ótrúliga irriteraður, tá eg fekk boðini, og eg má siga, at eg eri enn eitt sindur argur um, at teir valdu at blanda landsliðið uppí málið. Sum menniskjað og landsliðsvenjari haldi eg tó, at man skal taka ímóti eini slíkari umbering, sum tí, sum Kyndil nú bíður um.

### Ikki stórt úrval

Ein trupulleiki hjá landsliðsvenjaranum er tó eisini úrvalið, sum hann hevur at velja ímillum av føroyskum leikarum.

– Leikaratilfeingið er ikki tað allarstørsta í Føroyum, og vit vilja sjálvsagt stilla við sterkastu uppstilling, tá landsliðið endiliga skal í dyst. Tí hava vit eisini brúk fyri, at hava allar leikararnar hjá Kyndli tøkar til landsliðið, tí onkur teirra byrjar jú eisini inni.